# Stjørnufundur fyri títlingar

Intro: Longu í fornøld, hildu fólk at nakrar stjørnur hoyrdu saman, tí tær líktust myndum. Fólk byrjaðu tí at geva stjørnumyndunum nøvn og kallaðu tey eitt nú svanin, leyvan og líknandi. Serliga vóru tað gomlu grikkararnar ið funnu nógvar stjørnumyndir og góvu teimum nøvn, ofta vóru myndirnar djór ella persónar, so sum teir gudarnar ið teir trúu uppá. Í dag, verður tað tosað um 88 ymiskar stjørnumyndir, og kanska kenna tit onkra?
Man kan brúka stjørnumyndirnar sum eitt kort yvir himmalin, soleiðis sum vit síggja hann frá jørðini.
Tá man hyggur at stjørnumyndunum, sær tað út sum um at tær liggja tætt saman, men í veruleikanum liggja stjørnurnar í stjørnumyndunum fleiri ljósár frá hvørjari aðrari!
Tað sær eisini út sum um at stjørnumyndirnar flyta seg, tí tær eru ikki altíð sama stað á himlinum. Men tað eru ikki stjørnurnar ið flyta seg, tað er jørðin ið snarar runt um seg sjálva eina ferð um døgnið.
Í dag fari vit út at hyggja at stjørnum og stjørnumyndum.
Vit vera úti.

Títlingarnir býta seg í patriuljur
Umleið 7-10 min á hvørjum posti.

| nummar | Navn á stjørnumynd | søga | uppgáva | spurningur til "stjørnuleiðaran" |
|---|---|---|---|---|
| postur 1 | **Cassiopeia** | **Cassiopeia** var ein drotning úr grisku gudalæruni. Hon var sera vøkur, men eisini sera stolt. Hon reypaði sær av at eingin í heiminum var vakrari enn hon og dótturin Andromeda.<br>Sum straff fyri sína forfongiligheit, bleiv hon sett upp á himmalin millum stjørnurnar. Helvtina av árinum má hon venda á høvdinum og halda sær fast so hon ikki dettur niður av stjørnuhimmalinum.<br>Stjørnumyndin líkist einum M,ella W, alt eftir hvønn veg tú vendir.<br>Tá hon líkist einum M vendir hon rætt, og tá hon líkist w hongur hon við høvdinum niður | Vita um tit finna Cassiopeiu?<br><br>Gerið stjørnumyndina (M/W) burtur úr lutum ið tit finna úti (steinar ella okkurt) | **Spurningur:**<br>Hví varð Cassiopeia dømd til at sita millum stjørnurnar við høvdinum niðureftir helvtina av árinum?<br><br>Svar: Tí hon reypaði sær so nógv av hvussu vøkur hon og dótturin vóru. (stoltleiki) |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Postur 2 | **Orion**<br>**og sjeystjørnan** | Orion var ein hetja í grisku gudalæruni.<br>Orion var veiðimaður. Hann ætlaði at gifta seg við sjey prinsessum, men tað vildi kongurin ikki. Hann setti lív og heilsu í vanda fyri at fáa tær, men tað spældi ikki so væl av. Hann bleiv settur upp á stjørnu-<br>himmalin, har hann enn jagstrar tær 7 prinsessurnar. Tað er **sjeystjørnan.** Eisini nevnd Peiadurnar. Sjeystjørnan er plaserað á strá uppiyvir orion høgrumegin.<br><br>(ein hópur av 7 stjørnum- í veruleikanum nógv meira)<br><br>Stjørnumyndin Orion hevur 7 megin stjørnur, men sera eyðkent eru tær 3 stjørnurnar í orionbeltinum.<br><br>Bonus: stjørnan á vinstru øksl er ein reyð risastjørna ið eitur **Betelgeuse**. Hon er ein av klárastu stjørnunum á himlinum og 800 ferðir størri enn sólin.<br>Stjørnan á høgru øksl eitur Bellatrix.<br><br>Sjeystjørnan er ein hópur av stjørnum ið eisini kallast Pleiadirnar- liggja á skák uppiyvir Bellatrix. | vita um tit síggja Orion og Sjeystjørnuna<br><br>Syng ein sang um stjørnur ella har stjørnur eru við.<br><br>Dømi:<br><br>“eg vil telja stjørnurnar”<br>“nissumamma….stjørnurnar tær glampa…” | **Spurningur:**<br>Hvørjum vildi Orion sleppa at gifta seg við?<br><br>svar:<br>7 prinsessum |
| postur 3 | **Karlsvognurin** | Søgan um Karlsvognin stavar frá Norrønu gudalæruni og skal ímynda vognin hjá gudinum Tóri..<br><br>Karlsvognurin sæst alt árið. | Finn Karlvognin:<br><br>Plaserið tykkum, so tit ímynda karlsvognin<br><br>( 7 stjørnur) | Spurningur: Hvussu æt tann sterki gudurin ið átti Karlsvognin?<br><br>Svar:<br>Tórur |
| Postur 4 | **Norðstjørnan (Polaris)** | Man sigur, at tær tvær fremstu stjørnurnar á Karlsvogninum standa áleið á linju við Norðstjørnuna. Um tú leingir frástøðuna millum tær báðar stjørnurnar | Vís hvussu tær út frá karlsvogninum kunnu finna norðstjørnunm. | Spurningur:<br>Hví er tað snilt at duga at finna norðstjørnuna um man einki kumpas |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Tilfar.<br>Kumpas. | | fimm ferðir, so sært tú ta kláru norðstjørnuna.<br><br>Gott at duga at finna hana, tí man kann brúka hana at peila eftir- finna norð. | Vís genturnum við kumpassini, at norðstjørnan stendur í ein norðan.<br><br>gerið ein vogn til Tór. Patruljan skal bera eina gentu til næsta post. | hevur?<br><br>Svar: Tí so veit man hvønn veg norður er. |
| **Postur 5**<br>Ása<br><br>Tilfar “stjernemix”<br><br>ella bomm formað sum stjørnur | **Stjørnuskot** | Eitt stjørnuskot er í byrjanini ein lítil steinur ið flýgur ígjøgnum rúmdina.<br>Tá steinurin nærkast jørðini og fer ígjøgnum atosferuna, so brennur steinurin upp og fær luftina at lýsa sum eitt spor aftanfyri seg…tað er stjørnbuskotið.<br><br>Tá man sær eitt stjørnuskot, so kan man ynskja sær eitt hvørt. | **stafet:**<br><br>Renn sum eitt stjørnuskot.<br>Renn stafet - brúka onkra stjørnu, lummalykt ella annað sum stafettina.<br><br>patruljan fær 1 “stjernemix” ella anað fyri hvørja ferð tær renna strekkið. býta bommini millum sín at enda. | Eyka: Vita um tit síggja eitt stjørnuskot, og ynskið tykkum okkurt.<br><br>Um veðrið er klárt, so er stórur kjansur fyri at síggja eitt stjørnuskot, men man skal ofta bíða upp til ein tíma… |
| **Postur 6** | **Stjørnumyndirnar** | Posturin er inni.<br><br>Tekna stjørnumyndirnar ella klipp út.<br>Orion<br>Karlsvognurin pluss norðstjørnan<br>Cassiopeia<br><br>Sí viðhefta tilfar | **Posturin skal geva gentunum eina mynd av hvussu stjørnumyndirnar síggja út** | Repitera hvør er hvør- sí myndir herundir.<br><br>Seinasta myndin kann laminerast og klippast út.<br>Síðani kunnu tær prika hol í har stjørnurnar eru, og lýsa ígjøgnum tær við lummalykt.<br><br>Møguliga kunnu allar í staðin gera hendan aktivitetin at enda, um tíð er. |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | Ella á næsta skótafundi. |

**Bonus vitan at tosa um:**
Kendar stjørnur:
Sirius (Bjartasta stjørna á himlinum)
Vega
Betelgeuse (vinstra øksl hjá Orion) - Kanska kenna til filmin Beetlejuice (kanska hann er uppkallaður eftir stjørnuni)
Aldubáran: Erpartur av stjørnutekninum tarvinum.







Nordstjernen
Karlsvognen


"The Pleiades"
Aldebaran
Orion
Betelgeuse
"Orion's Belt"
Rigel
EarthSky.org


ORION


CASSIOPEIA


URSA MAJOR


Polaris
Cassiopeia
Ursa Major
Arcturus
Gemini
Leo

# STAR CONSTELLATION MAP




TAURUS
The Bull


ORION
The Hunter


SCORPIUS
The Scorpian


URSA MAJOR
The Great Bear


PISCES
The Fishes


CASSIOPEIA
The Queen


URSA MINOR
The Little Bear


PEGASUS
The Flying Horse


BOOTES
The Herdsman


GEMINI
The Twins


SAGITTARIUS
The Archer


LEO
The Lion


HERCULES


CANIS MAJOR
The Big Dog


PERSEUS


CYGNUS
The Swan